





um...
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
Sosialurin
...er lisin
-so ert
tú við!

# Koyrikort?

Teoriskeiðið til persónbil,
byrjar
mánadagin
**11. mai kl. 17.00**

FØRARASETRIÐ
KOYRISKÚLI

**Rúni Christiansen**
koyrilærari
**tel 21 47 65**

**Jekaragøta 10 • Tórshavn**

# Sandoyarstevna 2007

verður í Skálavík

**Fríggjadag 8. juni**
kl. 20.00 Tivoli letur upp.
kl. 20.00 Søluskúrurin við matsølu.
kl. 20.00 Rodeo-tarvurin.
kl. 23.00 Pleaser spæla til dans.

**Leygardagin 9. juni**
kl. 14.00 Gerhard Lognberg setur stevnuna.
kl. 14.00 Café og matsøla.
kl. 14.00 Tivoli letur upp.
kl. 14.30 Fuglaframsýning hjá Benjamin Lydersen
kl. 14.30 Listaframsýning hjá Randi Martinu Gunnarsdóttir og Martinu Eriksen. Framsýningarnar eru í skúlanum og lata aftur kl. 20.00.
kl. 14.30 Framsýning av ymiskum handaligum í Undirhúsinum. Framsýningin letur aftur kl. 20.00.
kl. 18.00 Sangløta við Missiónskórinum.
kl. 21.00 Sangløta við Betaniakórinum.
kl. 23.00 Dansur við Pleaser.
kl. 24.00 Páll á Reynatúgvu heldur midnáttarrøðuna.

**Sunnudagin 10. juni.**
kl. 14.00 Fólkafundur við standmyndina av Heðini Brú. Røðarar eru Kári P. Højgaard og Sørin Sørensen.
kl. 15.00 Café og matsøla
kl. 15.00 Tivoli letur upp.
kl. 15.00 Fuglaframsýning hjá Benjamin Lydersen.
kl. 15.00 Listaframsýning hjá Randi Martinu Gunnarsdóttir og Martinu Eriksen. Framsýningarnar eru í skúlanum og lata aftur kl. 18.00.
kl. 16.00 Framsýning av ymiskum handaligum í Undirhúsinum. Framsýningin letur aftur kl. 20.00.
kl. 18.00 Sangløta við Missiónskórinum.

# Set ferðslutrygdina í hásæti



**Dagligi leiðarin í Ráðnum fyri Ferðslutrygd seinastu 14 árini søkir nýggjar avbjóðingar, og tí leitar ráðið nú eftir nýggjum stjóra at standa á odda fyri arbeiðinum.**

**Umframt av hava**
- leiðaraevni
- samskiftingarevni og
- samskipanarevni

**skal stjórin eisini**
- vera kreativ/ur
- hava skapanargleði
- kunna hugfanga/engasjera seg fult fyri arbeiðinum hjá RFF
- eiga evni til at gera hugskot til veruleika, og ikki minst
- hava tev fyri eggjandi og upplýsandi marknaðarføring

**Uppgávurnar hjá stjóranum eru m.a.**
- at vera ígongdsetari
- at vera verkætlanarleiðari, og leiða fleiri verkætlanir samstundis
- at savna og uppbyggja fakliga vitan til virkna nýtslu í samfelagnum
- at samstarva við myndugleikar, stovnar, feløg, fyritøkur og einstaklingar um at virka fyri at betra um ferðslutrygdina
- at vera til reiðar sum persónur at trína fram at umboða sjónarmið RFF's

**Førleikar**
Tú hevur hóskandi útbúgving, har leiðsla, samskifti og førleiki at brúka framkomnar samskiftis- og kunningarhættir eru nakrir av hornasteinunum

Vit vænta, at tú hevur sterkar persónligar eginleikar, so sum arbeiðssemi, dynamikk og skapanarlyndi. Tú kennir føroyska samfelagið væl, og hevur skil fyri hvat ið rørist millum fólk. Tú dugir væl við fólki – høgum sum lágum, ungum sum eldri – og samskiftir skilliga bæði á føroyskum, skandinaviskum og enskum

Løn sambært avtalu

**Umsókn**
Heldur tú teg vera rætti persónur at røkja starvið, skalt tú senda umsókn við prógvum og viðmælum í seinasta lagi mánadagin 18. juni 2007. Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til Jón Kragesteen á telefon 210204 ella til Høgna í Stórustovu, starvsnevndarformann, á telefon 215510.

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Umsóknirnar, merktar »Umsókn til stjóra fyri RFF« á brævbjálvanum kunnu sendast til:

**Advokatvirkið**
Boks 85
FO-110 Tórshavn

ella við teldupostí til starvsnevndarformannin
his@post.olivant.fo

Ráðið fyri Ferðslutrygd varð stovnað í 1976, og endamálið er at virka fyri tryggari ferðslu. Ovasti myndugleiki hjá ráðnum er ráðsfundurin, sum verður hildin á hvørjum ári í apríl mánaði. Ráðsfundurin velur eina starvsnevnd við 5 fólkum, sum í tøttum samstarvi við stjóran setir út í kortið tey mál og mið, sum arbeiðast skal við.

Umframt stjóran er skrivstovufólk og fólk, sum arbeiða við útvaldum uppgávum. Meira kunning er at síggja á www.ferdslutrygd.fo